# Kunngerðin kemur í gildi 1. oktober

**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, sigur at kunngerðin um bann av innflutningi av tollfríum tubbaki longu er lýst at koma í gildi tann 1. oktober, og at tann avgerðin stendur við**



TOLLFRÍ SØLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tá kunngerðin um bann av innflutningi av tollfríðum tubbaki upprunaliga skuldi koma í gildi tann 1. juli 2008, valdi Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, at víkja undan trýstinum frá vinnuni og vinnumálaráðnum. Argumentið hjá vinnuni fyri at fáa kunngerðina útsetta var, at summarsesongin fór at byrja tá, og at hon longu hevði gjørt fyrireikingarnar til summarsesongina.

- Hetta var eitt handfast argument, sum var til at skilja, og í gjørdu vit av at útseta ígildiskomuna til 1. oktober, sigur Karsten Hansen.

Nú er summarsesongin av, og tað argumentið kann so ikki nýtast longur. Vinnan hevur verið inni til hoyringar, og

- Nú skuldi vinnan havt fingið tíð til at laga seg til nýggju kunngerðina. Upprunaliga bóðu tey um at fáa kunngerðina útsetta til 1. september, og vit góvu teimum til 1. oktober, so í øllum førum hevur vinnan havt góða tíð at laga seg til broytingarnar, sum eru á veg, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Tó siga bæði Smyril Line og Atlantic Airways, at freistin, sum tey hava fingið er alt ov stutt, og at tey ongan kjans hava havt fyri at finna alternativar inntøkukeldur uppá so stutta tíð.

P/F Vága Floghavn hevur í dag boðað frá, at rættindini til at hava tollfría sølu í Vága Floghavn nú verður boðin út. Hetta er ein møguleiki hjá feløgunum, men tað er greitt, at bara annað felagið, um nakað av teimum, kann fáa hesi rættindi, og at hitt felagið ella bæði, standa fyri tapi í millióna-upphæddum eftir at tollfría sølan av tubbaki heldur uppat.

# Tollfría sølan í Vága Floghavn boðin út

**Nevndin í P/F Vága Floghavn hevur í tíðindaskrivi í dag boðað frá, at hon nú fer at bjóða raksturin av virksemi við tollfríari sølu í Vága Floghavn út alment**

TOLLFRÍ SØLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nú verður rætturin til rakstur av tollfríari sølu frá tveimum nýggjum handilshølum í Vága Floghavn boðin út. Rætturin fevnir um tvey nýggj handilshølir, eitt fyri komandi og eitt fyri farandi ferðafólk.

Ætlanin er, at tollfríu sølubúðirnar skulu lata upp longu um 15. november í ár, men hugsast kann at hetta kann seinkast, um byggiarbeiðið av nýggju hølunum verður seinkað.

Tá latið verður upp, er ætlanin at tollfríu sølubúðirnar skulu verða opnar fyri sølu hvønn dag í vikuni í minsta lagi frá klokkan 8.00 til klokkan 20.00, og annars í samband við alla regluliga altjóða flúgving um Vága Floghavn, bæði við flogførum og tyrlum.

## Øll kunnu bjóða

Øll tey, ið hava áhuga og sum uppfylla krøvini í útboðstreytunum, og sum hava keypt útboðstilfarið frá P/F Vága Floghavn, kunnu lata inn tilboð. Men fyri at fáa útboðstilfarið skulu áhugair tilboðsgevarar rinda eitt gjald á 10 túsind krónur til P/F Vága Floghavn.

Freistin at lata eitt tilboð inn gongur út mikudagin tann 1. oktober á middegi.

## Metast í tveimum umførum

Metingin av innkomnu tilboðunum verður framd í tveimum umførum, nevnliga útveljingarumfarinum, har mett verður um førleikarnar hjá tilboðsgevaranum, og síðan tillutingarumfarið, har ítøkilig meting verður framd av teimum, sum eru mett at hava neyðugu førleikarnar at reka útbjóðaða virksemið.

P/F Vága Floghavn væntar at hava valt vinanndi tilboðið í viku 41 ella viku 42, sum er umleið hálvan oktober.

- P/F Vága Floghavn hevur stórar vónir um, at ætlaða tollfría sølan í Vága Floghavn fer at gerast munandi inntøkukelda fyri felagið, soleiðs at raksturin av Vága Floghavn framyvir kemur at javnviga og at peningur verður til ger av neyðugu íløgunum í Vága Floghavn, sigur Kitty May Ellefsen, forkvinna í P/F Vága floghavn.

## Fleiri um boðið



Eftir hvat skilst, so verða fleiri um boðið at bjóða uppá rættin til at reka tollfríu søluna í Vága Floghavn. Jákup Sverri Kass, sølu- og marknaðarleiðari á Smyril Line, hevur váttað, at Smyril Line verður eitt av feløgunum, sum kemur at liggja framvið at vinna sær rættin til virksemið.

Magni Arge, sum er stjóri í Atlantic Airways, váttar eisini, at Atlantic Airways fer at bjóða uppá rættin til at reka virksemið í Vága Floghavn.

Hugsast kann tó eisini, at onnur feløg eru áhugaði í virkseminum, og tískil verður tað ein kapping millum fleiri feløg um at vinna sær henda rættin, havandi í huga at øll kunnu bjóða.